# Vit liva av øðrum enn nationalismu



*Malan Marnersdóttir helt flaggrøðuna á Giljanesi í ár*

**Flaggdagin kemur fosturlandsalskurin fram í okkum øllum. Men tað skal eisini annað til, segði Malan Marnersdóttir millum annað í flaggrøðu á Giljanesi flaggdagin**

FLAGGRØÐA
*Edvard Joensen*

**Giljanes:** Tað er ein dygd at vera góður við flaggið og landið. Men tað skal vera eitt mark fyri, hvat vit kunnu bjóða flagginum og brúka tað til, minti Malan Marnersdóttir, rektari á Fróðskaparsetrinum, á í flaggrøðu síni á Giljanesi.

Malan Marnersdóttir tók støði í tí at liva í Føroyum. Hon vísti til rithøvundar sum Heðin Brú, Jóannes Nielsen og Jens Paula Heinesen.

Flaggdagurin er ein av døgunum, har vit gerast national, vísti Malan Marnersdóttir á, og tók í eina yrking hjá Jóannesi Nielsen, sum heldur, at vit liva ikki av berari nationalismu í Føroyum.

»Júst so«, sigur Jóannes Nielsen. »Nationalisma eru ov stórar og ov nógvar tjóðskaparkenslur og tí betur, kunnu vit svara, lív okkara er fult av øllum møguligum øðrum enn tí.«

Vit velja okkum symbol upp á tjóðina og útnevna ymisk ting og fyribrigdi at vera serføroyskar ímyndir, visti Malan Marnersdóttir á.

Eitt nú føroyskur dansur og grindaboð, sum verða førd fram sum nakað heilt serføroyskt. Ikki tí at tað er tað, vit gera mest av í Føroyum. Als ikki, segði hon. Vit mála nógv oftari hús, pussa bilar ella tosa nógv meira í fartelefon í Føroyum, enn vit dansa føroyskan dans ella fara í grind.

– Men tjóðin er tað, sum vit vilja og siga hon er, og tjóðdagarnir eru týdningarmikil symbol í so máta. Við teimum stíva vit tilvitan okkara av, vit fara kanska eina mest til flaggdagshald við børnunum at vísa teimum, hvussu vit samtykkja, at vit eru tey, vit vilja vera soleiðis savnað og sum heild, segði Malan Marnersdóttir millum annað í flaggrøðuni.

Men flaggdagar valdast, vísti hon á og sipaði til tað hendingina, sum varð víst um allan heim herfyri, tá ein amerikanskur hermaður sveipaði Stars and Stripes um høvdið á eini irakiskari standmynd.

Flaggið skal viðfarast við virðing, eins og vit eisini skulu vísa virðing fyri øðrum enn okkara egna, tí fløgg povokera og ímynda nógv meira enn tað, tey eru, vísti hon á.

Malan Marnersdóttir fegnaðist um, at vit síggja og leggja merki til flagg okkara. Tí tað kann einki vera verri enn at hava eitt flagg, sum eingin leggur merki til, helt hon.

– Hvat høvdu føroyingar hildið, um eingin legði merki til flaggið, og fólk bara lótu sum luft, hóast tað tað var har? spurdi hon.

Vit liva ikki av symbolum og tjóðskaparkenslu. Tað eru ikki grækarismessa, flaggdagur og ólavsøka, sum einsamøll halda okkum á lívi. Hetta eru ritual, sum verða endurtikin á hvørjum ári, eins og jól, páskir og føðingardagar. Men hesir dagar hava týdning, vísti Malan Marnersdóttir á.

– Tað eru teir góðu dagarnir, sum gera tað liviligt her á landi. Teir góðu dagarnir, tá ið tað sæst, at tað ger mun, at vit virka og gera, tað vit kunnu. Teir góðu dagarnir skulu til, fyri at vit skulu koma ígjøgnum teir nógvu vátu og blásandi dagarnar.




Tilboðini eru galdandi 1.- 3. mai ella so leingi, vøra er á goymslu. Fyrivarni verður tikið móti prentvillum.

TELEBÚÐIN Tórshavn 317010 Norðstreymoy 421000 Miðvágur 332000 Klaksvík 457488 Sandur 361000 Tvøroyri 371000 Saltangará 404400




# Skeltingin er óneyv

**At tað framvegis verður skeltað við, at ferja siglir um Vestmannasund, er forsømilsi, viðgongur landsverkfrøðingurin . Hann væntar, at skeltini heilt skjótt verða broytt**

SKELTING
*Edvard Joensen*




*Framvegis fáa fók at vita, at ferja siglir av Oyrargjógv, hóast tað gongur væl á fimta mánað, síðan hon gavst at sigla. Heldur ikki vegalongdin til Havnar samsvarar við tað, sum stendur á skeltinum. Hetta fer landsverkfrøðingurin at broyta í næstu framtíð*

**Vágar:** Tað stendur framvegis á ferðsluskeltum bæði í Vágum og í Norðurstreymoy, at ferja siglir um Vestmannasund. Hóast tað líður væl á fimta mánað, síðan siglingin helt uppat.

Hóat tað nærkast fimm mánaðum síðan, Vágatunnilin lat upp, og ferðslan varð beind burtur av Oyrargjógv, vísa ferðsluskeltini, ið eitt nú fremmandafólk, sum koma um flogvøllin, síggja, at siglast skal ella kann um Vestmannasund av Oyrargjógv.

Fólk í ferðavinnuni hava víst á tað óhepna í, at fremmandafólk, sum kanska ikki hava fingið nóg neyvar uplýsingar heimanífrá, kunnu koma út fyri at koyra norður á Oyrargjógv at seta seg at bíða eftir ferjuni í teirri trúgv, at hon framvegis siglir.

Ein teirra, sum hevur víst á hendan møguleikan, sigur, at kemur fremmant ferðafólk eitt nú við flogfari og leigar sær bil á flogvøllinum, kann tað skjótt enda við, at hann stendur einsamallur á Oyrargjógv og undrast á, hvat verður av ferjuni.

Tí við flogvøllin eru skelti, sum vísa til, at so og so nógvir kilometrar eru til Havnar. Ávegis skal koyrast til Oyrargjáar, har skeltið sigur frá, at ferja er.

Sama skilið er aftur í Sandavági. Har er eisini skelti, sum vísir til ferju á Oyrargjógv. Og tá so komið verður norður á Fútaklett, stendur eitt skelti við vegin, sum vísir á, at her verður sneitt av til Oyrargjáar.

Hinumegin er ikki mætari, vísir sama keldan á. Víst verður við skeltum til flogvøllin. Men saman við skeltum til Vestmanna. Og við tunnilsmunnan í Leynum stendur bara Vágar, men einki, sum vísir til, at her skal sneiðast av fyri at náa flogvøllinum.

Og í Vestmanna er verri enn á Oyrargjógv, tí har liggur í løtuni Ternan beint við skeltini, sum framvegis vísa, at her skal farast, tá ein skal við ferju vestur í Vágar, har flogvøllurin er.

– Í Vestmanna kunnu frammandafók, sum ikki er nóg væl upplýst, so verða standandi og bíða, til portrið fer niður, vísir keldan á.

Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur, sigur, at har eru tey greið um trupulleikan. Og hann viðgongur samstundis, at talan er um forsømilsi, at hesi skeltini ikki eru niðurtikin.

Tó er tað ikki so, at tey bara skulu takast burtur, Tað skulu nýggj setast uppaftur. Eitt nú eru vegalongdirnar millum Vágar og restina av landinum broyttar, nú ikki verður koyrt eftir Vestmannavegnum.

Men tað er ikki Landsverkfrøðingurin einsamallur, sum viðgerð slíkt. Tað skal fyri í Landsferðslunevndini, har millum onnur løgreglan og Bilefirlitið eisini eru umboðað, vísir landsverkfrøðinguin á.

Men hann váttar tó, at tað verður heilt skjótt, at skeltingin verður broytt.

# Pengarnir ganga undan

**Játtanin til arbeiðið í Gásadlastunlinum í ár verður nakað skjótt uppbrúkt. Tó væntar landsverkfrøðingurin, at loftið verður tryggjað, áðrenn uppi er**

JÁTTAN
*Edvard Joensen*



*Gásadalsfólk fáa serskipan at ferðast gjøgnum tunnilin, meðan hann er í gerð. Onnur mugu nýta gomlu gøtuna*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Peningurin, sum avsettur er til arbeiðið í Gásadalstunlinum í ár, verður skjótt uppi, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur. Hann væntar tó, at loftið verður liðugt tryggjað, áðrenn teir gevast at arbeiða.

Men hóast so verður, verður ikki latið upp fyri almennari ferðslu til Gásadal kortini, sigur hann. Gásadalsfólk fáa eina serskipan, men onnur mugu famvegis brúka gomlu gøtuna um fjallið.

Spurdur um tað fer at bera til eitt nú at fáa eina avtalu um at flyta ferðaløg gjøgnum tunnilin við bussi, sigur landsverkfrøðingurin, at tað er ikki tikin nøkur støða til enn.

Hann útihýsir ikki møguleikanum, men heldur, at um so skuldi verðið, verður tað fyri rokning. Tí tað fer at kosta at senda boð eftir fólki at lata upp og aftur í slíkum førum.

Landsverkfrøðingurin veit eins og onnur av, at fólk av og á ganga gjøgnum tunnilin. Men tað er ikki loyvt, tí talan er um eitt byggipláss, har almenn ferðsla ikki er loyvd. Fólk mugu undir øllum umstøðum vænta, at slík ferðsla er fyri egna ábyrgd, sigur landsverkførðingurin.


# Móttøka



**Vit eru flutt í nýggj hølir í J.C. Svabosgøtu 8.**

*Móttøka verður*

*hósdagin 1. mai kl. 14.00 til 18.00*

**Vit bjóða eina lítla máltíð og okkurt leskiligt.**

**Høvi verður at síggja og royna okkara vørur.**

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

**Vinaliga**

Opið er gerandisdagar kl. 12 - 17

Ergo & Hjálpartól - alt innan hjálpartól - ergo.fo

J.C. Svabosgøta 8 • FR-100 Tórshavn
Tel. 315 777 • Fax 315 772 •Fartel. 215 778
Teldupost: ergo@post.olivant.fo • Heimasíða: www.ergo.fo